Viðmerkingar

Takið heldur báðar BBC-ræsurnar

– og latið TV3 liggja fyribils, um ráðini ikki eru til annað

Fyri nøkrum árum síðani tók byráðið í Havn stig til at tynna út í parabolunum í býnum. Byráðið gjørdi av sjálvt at seta upp eina stora parabol og síðan at senda eitt úrval av útlendskum sjónvarpsstoðum til ibúgvarnar í Havn.

Hetta var ein góð avgerð, og úrvalið hevur verið so fjølbroytt, at tey flestu hava fingið hugin fyltan.

Men einki stendur í stað, og nú henda broytingar hjá BBC, sum fáa avleiðingar fyri sjónvarpshyggjararnar í Havnar kommunu. Sum tey flestu helst vita, so verður tann BBC-rásin, sum vit síggja, til tvær ræsur, onnur við tíðindum og samfelagsligum innihaldi yvirhevur, og hin við undirhaldi. Og tær verða hvør á sínum fylgisveini. Samstundis er eitt ynski kyknað upp aftur hjá summum, at fáa donsku TV3-rásina í staðin fyri ta norsku, sum nú sæst í Havn.

Vit eru nógv, sum hava vant okkum við, at til ber at fáa framúr góðar tíðindasendingar frá BBC so at siga hvønn tíma mesta partin av samdøgrinum, og nú er ætlanin hjá teimum at gera hesar sendingar uppaftur betri. Vit vita flest øll, at tíðindaflutningur ongantíð er partleysur, men skulu vit hava útlendskar tíðindasendingar inn í stovuna á annan hátt enn gjøgnum Sjónvarp Føroya, so kunnu vit illa leggja okkum í tryggari hendur enn tær hjá tíðindafólkunum hjá BBC, og ilt er at finna nakað, sum kann metast upp ímóti tí undirhaldi, sum tey har gera.

Tí eiga vit at taka báðar BBC-ræsurnar, og gjalda tað tað kostar at hava hinar triggjar aftrat, sum nú eru at síggja um Havnarleiðirnar. Ber tað ikki til fíggjarliga í løtuni, latið so heldur TV3 liggja, til ráðini verða betri. Danska útgávan av tí støðini er einki mætari enn tann norska, so eingin veruligur saknur er í henni, sjálvt um onkur sigur seg tráa eftir henni. Og at taka hana, bara tí at hon er donsk, er ógrundað, tí donskum sjónvarpi síggja vit rættiliga fitt av frammanundan.

Tað er kunnleiki, vitan og hjartalag, sum menta tjóðina, ikki dusandi lættisoppaundirhald ella sjónvarpsharðskapur, sum flest øll sjónvørp flóta yvir av.

Pauli Nielsen.

Judomenn fyriskipa dans á flatlondum

Fyri at luttøkan á komandi oyggjaleikum á Gibraltar skal gerast veruleiki, fara teir føroysku judoiðkararnir, ið eru búsitandi í Danmark, at skipa fyri almennum dansi í Århus, Keypmannahavn og Odense. Talan er um eitt »cocktail tiltak« við livandi tónleiki og plátuvendara.

DIA MIDJORD

Nógvur peningur skal fáast til vega, áðrenn ein kann vissa sær pláss til komandi oyggjaleikir á Gibraltar. Ferðin er kostnaðarmikil, og føroyskir judoiðkarar, ið eru búsitandi niðri í Danmark, eru nú farnir í holtur við eitt spennandi tiltak, so peningur kann útvegast til komandi oyggjaleikakapping.

Cocktail dansir

Í trimum býum verður skipað fyri »cocktail dansi«. Hetta er dansitiltak við blandaðum tónleiki - tónleikabólki og plátuvendara. Lagt verður til brots í Århus 4. februar, kl. 22.00. Tiltakið verður í »Laden«, sum liggur á Edwin Rahrsvej 6 í Brabrand.

Til ber at keypa atgongumerki í forsølu. Meira um hetta fæst at vita frá Aarstovu. Tað verður tónleikabólkurin Malaria, ið fer at spæla og Benny Ejdesgaard, fer at venda nýggjum og gomlum, góðum plátum.

Tónleikararnir í Malaria eru: Súni Danielsen, Rógvi á Rógvi, Jóan Petur Andreasen, Leivur Thomsen og aðrir. Hesir koma ymsasteðs frá í Danmark.

Í Føroyahúsinum

4. mars, kl. 22.00 verður so Føroyahúsið karmur um hetta »cocktail tiltak«. Tað verða tónleikararnir Eyðun Nolsøe og Eyðun Hansen, ið saman við Benny Ejdesgaard, fara at fáa futt í føroyingarnar og onnur í Keypmannahavnar umráðnum.

Hesir tríggir hava roynt seg áður í Føroyahúsinum, og tá eydnaðist tiltakið stak væl. Til ber eisini hesaferð at keypa atgongumerkið í forsølu frá 1. februar. Hesi fáast í Føroyahúsinum.

Í løtuni verður eisini arbeitt við einum slíkum tiltaki í Odense. Hetta tiltakið skal verða fyrst í apríl-mánaði. Leitað verður eftir høskandi hølum í miðbýnum. Roynt verður at bera so í bandi, at onnur fólk á Fjóni eisini hava møguleikan at sleppa til tiltakið. Her verður hugsað um tog- og buss-samband.

Damon Hill koyrdi ov skjótt

Bretski Formel 1 koyrarin, Damon Hill, er ákærdur fyri at hava koyrt ov skjótt á einum motorvegi norðan fyri London.

Løgreglan vil vera við, at Damon Hill koyrdi meira enn 160 km/t, tá hann varð steðgaður á motorvegnum í Oxfordshire norðan fyri London.

Damon Hill, sum er Formel 1 koyrari hjá felagnum Williams Renault, varð tikin fimta desember í fjør.

Damon Hill skal í undirrættin fyrsta mars.

Hann er ákærdur fyri at hava koyrt við einari ferð upp á 165 km/t.

Hægst loyvda ferð á motorvegum í Bretlandi er 110 km/t.

Damon Hill gjørdist nummar tvey í kappingini um Formel 1 heimsmeistaraheitið í fjør.

Týskarin Michael Schumacher vann heimsmeistarakappingina.

Brøv til Dimmalætting

Útvarp Føroya ber rong tíðindi

Harri blaðstjóri, vinarliga set hesa rættleiðing í blað tygara.

Mikukvøldið 4. januar 1995 hevði Útvarp Føroya tíðindi frá fundi, sum hevði verið millum landsstýrismannin í heilsumálum, sjúkrahusstjóran, umboð fyri Landssjúkrahúsið o.o. viðvíkjandi ávísum viðurskiftum á skurðgongdini á Landssjúkrahúsinum.

Í hesum tíðindum varð sagt, at: »sjúkrasystrafelagið fleiri ferðir heitti á sjúkrahústjóran um at fáa ein fund í lag við stýrið fyri Landssjúkrahúsið, uttan at nakað spurdist burturúr.«

Hetta eru beinleiðis rong tíðindi. Sjúkrahústjórin hevur onga áheitan fingið frá Sjúkrasystrafelagnum um fund við stýrið fyri Landssjúkrahúsið, men stýrislimirnir fingu *eina* áheitan frá Sjúkrasystrafelagnum um fund, og hvussu tað gekst við hesum fundi greiddi útvarpið væl og virðiligа frá í tíðindasendingini kvøldið eftir.

Formaðurin fyri Sjúkrasystrafelagið, Tórunn Patursson, hevur sagt mær, at hon hevur ikki givið útvarpinum hesar upplýsingar og tíðindamaður útvarpsins hevur hvørki spurt undirritaðu ella sjúkrahústjóran um hesi viðurskifti. Niðurstøðan má tí vera, at útvarpið sjálvt hevur yrkt hesi tíðindi, og *tað* er grov manipulatión av sannleikanum. Tað er skakandi, at slíkt kann koma fyri í einum almennum tíðindastovni, ið skal bera objektiv og rætt tíðindi og má hetta *harðliga átalast*. Eg setti meg í samband við útvarpið dagin eftir og bað um at fáa hesi tíðindi rættað og hóast tíðindamaður útvarpsins, sum skrivað hevði hesi tíðindi, segði at ein rætting skuldi koma í útvarpið, og sjálvt um hann las hesa rætting fyri mær í telefonini, so kom hon ikki við í útvarpið.

At enda ein stutt viðmerking til stýrislimin Birgir Waag Høgnesen, sum í bløðunum hevur lagt meg undir at bera ósonn tíðindi í útvarpinum. Eg havi *ongantíð* sagt við útvarpið, at stýrið avlýsti fundin við Sjúkrasystrafelagið, og tað hevur Útvarp Føroya heldur ikki sagt, so gud viti hvar Birgir Waag Høgnesen hevur lurtað.

Kristianna Rein,
formaður í stýrinum fyri Landssjúkrahúsið.

Framtaksgrunnurin! ella?

So bleiv nevndin fyri Framtaksgrunnin vald. Hetta gjørdist eitt stórt vónbrot. Tey føroysku umboðini eru øll úr einum og sama flokki, Sambandsflokkinum.

Ikki hevur Edmund løgmaður verið heppin í sínum vali.

Framtaksgrunnurin er frá fyrsta degi av gjørdur partapolitiskur.

Hvat siga okkara vinnulívsfólk til hetta? Hvat siga okkara politikarar?

Árið 1995 fekk eina vánaliga byrjan.

Tað er næstan synd at kalla henda grunn fyri ein framtaksgrunn.

Sambandsgrunnur uttan nakað framtak. Eitt krotusmíð av timburhandlum.

Dia Ellindsson.

Dómarakanningin av bankagøluni bráðneyðug

Nógvar kanningar, nógv álit eru gjørd her í Føroyum um mong ymisk mál. Men eftir tað hendir gjarna ikki meira. Hetta hava verið meinigar kanningar, sum akademikarar/búrokratar/politikarar (als ikki óheftir) hava gjørt, við als ongum lógarheimildum til innlit ella avgerðarrætti. Tí onki løgið, úrslitið gjørdist so vánaligt, als ongin uppruddning hend. Nei, har skal annað til, áðrenn nakað munar: Reglulig dómarakanning, við øllum kravdum heimildum.

Velja ongir dómarar vera við, verða teir heiðurligu, óheftu borgarar, ið valdir verða til at manna rannsóknarrættin, strax at fáa allar kravdar, neyðugar lógarheimildir, til innlit, og avgerðarrætt, til at vilja til botns, í tí essentiella, hjá øllum þertum, í hesum stóra, fløkta sakarmáli: Nú skulu øll kort á borðið, lík í lastini verða als ikki góðtikin longur. At byggja á rotinskap er sum kunnugt verri enn onki, tá fellur alt skjótt í grús.

RIN.

Politiskar viðmerkingar

Oljuboringar í Lopra II

Beint undan at føroyska heimastýrið varð sett undir danska umsiting, fingu vit lóggávu- og umsitingarvald yvir ráevnunum í undirgrundini. – Hví so knappliga, søgdu føroyingar við ein munn? Tað er vorðið sjónskari og sjónskari, hví tað er so, til tað nú loksins í avtaluni frá 17. nov. 1994 stendur púra greitt

Mánadagin 16.1.95 varð so álitið í oljuboringunum í Lopra lagt á tingborð. Um ikki orðingin í álitinum var sum ein kundi vænta hana, so skilti ein millum limjurnar, at farið verður undir boringarnar aftur, og tað var júst tað endamálið var við uppskotinum.

Í Sosialinum nú um degina varð málborið seg soleiðis, at eftir at Kr.F. hevði reist oljumálið aftur á tingi, varð kallað til fundar í oljunevndini, so í mínari verð er eingin ivi um, at uppskot okkara hevur gjørt gagn, og at menn fara aftur undir boringarnar sum skjótast, og er hetta eisini bráðneyðugt, tí Føroya land er á fallandi føti, og skal eg tí eisini koma inn á nøkur peningalig sjónarmið um olju, so menn ikki enn einaferð verða tiknir við nøsini.

Eyri nøkrum árum síðani var tað eingin, sum trúði, at havbotnur okkara goymdi olju- og gassríkidømi. Gass- og oljuboringarnar eystan fyri fiskimarkið hava fört til nýggjan jarðfrøðiligan hugsunarháttur um at olja finnist í undirgrund okkara og tí hevur verið biðið um at fáa loyvi til at gera jarðfrøðiligar/seismiskar kanningar við Føroyar og í Føroyum.

Eina føroyska oljulóggávu

Danskur yvirvaldsrættur yvir Føroyum og harundir kontinentalsokkli okkara er ein veruleiki, men okur fingu rættin til at yvirtaka ráevnini í undirgrundini sum sermál. Hetta merkir, at vit hava LÓGGÁVUVALD og UMSITINGARVALD yvir ráevnunum í undirgrundini. Løgtingið má tí til at viðtaka eina føroyska oljulóggávu, og verður hon lógarkarmurin um eina føroyska oljuvinnu.

Miðlinjuspurningurin millum Ónagland og Føroyar er enn ikki avgjørdur, og tí er trupult hjá okkum at gera konsesjónsrundu til boringar á tí økinum, ið vit stríðast um við bretar.

Boringin í Lopra er eitt sindur annarleiðis, har kunnu vit halda fram, um vit ikki hava bundið okkum á hendur og føtur, eitt nú við Western Geofysical, og tí er tað av alt avgerandi týðningi, at byrja aftur í Lopra beinan vegin. Sjálvandi kunnu vit koma í ein sokallaðan TURRAN brunn, men tað øvugta kann eisini vera tilfeldi, at vit finna olju, men í øllum førum fáa vit so tað úrslit, sum eg greiddi frá í mínum innleggi til 1. viðgerð um sedimentløgini.

Ognarrætturin

Føroyingar eiga ognarrættin til tilfeingið í undirgrundini. Hetta vil siga, at vit føroyingar hava lóggávuvald og umsitingarvald yvir tilfeinginum í føroysku undirgrundini og merkir hetta so aftur, at tað eru vit føroyingar, sum hava dispositiónsrættin (nýtslurættin) yvir hesum virðum. Henda rætt fingu vit í undirgrundaravtaluni 23. des. 1992.

17. nov. 1994

Men hvat stendur so í felags – føroysku og donsku – yvirlýsingini frá 17. nov. 1994, sum vísir, at danir vilja taka undirgrundina aftur. Har stendur svart uppá hvítt: »at regeringen er indforstået med, at ministerier og styrelser efter aftale med landsstyret udpeger eksperter, der kan deltage i landsstyrets udredningsarbejde på kulbrinteområdet.«

Sjálvandi fara teir menn (ekspertarnir), sum eru útpeikaðir av tí donsku stjórnini, at arbeiða fyri áhugamálunum hjá tí donsku stjórnini, sum teir eru løntir av. Altso arbeiða teir IKKI fyri Føroya landsstýri, men fyri ta donsku stjórnina.

Tað vil siga, at sjálvt um vit skulu eitast fyri at hava yvirtikið ráevnini í undirgrund okkara, so skulu danskir serfrøðingar frá donskum ministerium fyri tað fyrsta:

1. Skriva lógirnar og reglugerðirnar, í okkara oljulóggávu, ið skulu galda í einari møguligari oljuvinnu (jb. hvat ið hendi við reglugerðini um 200.000 m. grunnin).
2. Lóggeva, stinga út í kortið og beinleiðis planleggja oljuvinnuna í Føroyum – minnist til, at teir skulu gera »UDREDNINGSARBEJDET«.

Eingin ivi er um, at teir koma at lóggeva, stinga út í kortið og planleggja soleiðis – at oljuvinnan verður løgd soleiðis tilrættis til tess, at nøkta donsk áhugamál og ikki føroysk.

Hetta merkir so aftur, at AVKASTIÐ, tað er skattur og arbeiði endar í Danmark og ikki í Føroyum frá einari møguligari oljuvinnu.

Undirgrund okkara fer so á henda hátt aftur at vera tikin frá okkum og vit gerast eitt nýtt Hetland (vit hava bankamálið í »frisk erindring«).

Hetland eitt útpínt hjáland

Eg vil her taka tvey dømi fram fyri at lýsa munin. Vónandi koma vit ikki at líkjast Hetlandi. Vit vilja tí her ávara politikarar okkara, ið sita við avgerðarrættinum um at vera sera varnar í oljuspurninginum.

Í Hetlandi er framleiðslan í dag uppá uml. 40 milliardir kr., sum er uml. helvtina av samlaðu bretsku framleiðsluni.

Avkastið í beinleiðis skatti til enska statskassan er 8 milliardir. Lønir tilsamans av uml. 150.000 arbeiðsplássum er uml. 25 mia. Men Hetland fær í beinleiðis skatti av 8 mia. bert 350 mió. Í arbeiði til Hetlands av bert 1000 arbeiðsplássum 200 mió. Til samans í avkasti til Hetlands uml. 550 mió. Men avkastið til Stórabretland er uppá meira enn 30 mia.

So statt fær Hetland bert uml. 1,5% av avkastinum, og England fær uml. 98,5% av avkastinum.

Noreg framleiddi í 1993 fyri 112 mia. kr. og ríkiskassin í Oslo fekk í skatti av hesum 112 mia. – 28 mia., og tað er 25% í skatti av bruttoinntøkuni.

Foinhaven

Metingin av seinastu boringini hjá eingilsk-monnum í kelduni Foinhaven beint við tað føroyska markið er, at henda keldan innheldur fyri 350 milliardir kr. Vanliga meta menn, at ein kelda skal tømast eftir 20 árum, so vil henda keldan geva 17 milliardir kr. um árið.

England hevur uml. 300.000 arbeiðsplóss í oljuvinnuni. Tá ið teir hava eina helvt í Norðsjónum, so hava teir uml. 150.000 arbeiðsplóss í hetlendsku oljuvinnuni og harav hava hetlendingar, sum nevnt fyrr, bert tey uml. 1000 arbeiðsplássini.

Hvat viðvíkir Foinhaven so eiga føroyingar beinan vegin at gera krav uppá ein part av hesari olju, tí tað eiga vit samb. galdandi oljureglum, tá ið keldan liggur so nær við markið. Vit verða allarhelst ov seinir her eins og vit vóru, tá ið eingilskmenn fingu gráu sonuna innan fyri fiskimark okkara. Vit skuldu eins og eingilskmenn gjørt krav um meira øki, so høvdu vit eisini fingið eina gráa sonu eystan fyri markið.

Føroyar

Um Føroyar sjálvar útvinna fyri uml. 10 milliardir um árið, tað kann vera úr bert einari oljukeldu, so fær:

Landskassin (eins og Noreg) í skatti 25%, t.e. 2,5 mia. kr. 5000 arbeiðsplóss 0,5 mia. kr. Hetta gevur 3,0 mia. kr.

Um vit finna olju í Lopra ella í nærumhvørvinum við Føroyar, eina keldu, sum hevur eitt virði uppá 150 milliardir og tøma hana uppá 15 ár, tað eru 10 milliardir um árið, so vil hetta geva landskassanum í beinleiðis skatti 3 milliardir kr., og er hetta tal so stórt, at fíggjarpolitikkarar okkara als ongar trupulleikar høvdu havt við at leggja ein realistiska fíggjarætlan.

Danir annan politikk

Lítið er at ivast í, at danir ynskja IKKI eina oljuvinnu við Føroyar, sum gevur bert 10 milliardir í umsetningi, men eina fleirfaldaða hesa t.d. einar 50 milliardir sum í Hetlandi, og teir so fáa næstan alt avkastið í tann danska statskassan eisini eins og í Hetlandi eini 98-99% og vit bert fáa 1-2%, so er væntandi at øll oljan við Føroyar verður tømd uppá 20-40 ár.

Hvat er so til ráða at taka?

Hevur bankamálið víst okkum føroyingum, hvussu vit verða tiknir við nøsini, so kann oljumálið snúgva seg um 1000 ferðir so nógvar milliardir, sum í bankanum, so her mugu vit vera væl meira varnir.

Tað, ið so verður til ráða at taka er:

- Lógararbeiðið og planleggingararbeiðið skal gerast fyri Føroya landsstýri og ikki fyri donsku stjórnina.
- tað skal gerast av fólkum, sum eru sett og lønt av Føroya landsstýri, og arbeiða fyri landsstýrið.
- Vantar okkum serkønt fólk, fáa vit hetta alla staðir frá í verðini – USA, Fraklandi, Japan o.s.fr.

Harafturat skulu føroyingar útbúgvast beinanvegin í oljuvísund. Lat meg her nevna Universitetið í Trondheimi í Noreg, í Aberdeen og Glasgow í Skotlandi.

Í Noregi vóru eisini útlendingar í byrjanini, men nú er stórt sæð alt virksemi yvirtikið av norðmonnum. Tí ynskja vit, at ein føroyingur stendur undir liðini á hvørjum útlendingi, ið kemur at arbeiða her.

Oljueyðræning

Tað vit skulu ansa sera væl eftir er, at vit ikki verða eins og hetlendingar, tá ið ov seint er, finna útav, at ein oljueyðræning er farin fram, antin av okkum sjálvum ella øðrum.

Vit skulu eisini ansa eftir, at vit ikki tey næstu 20 árini gjalda einar 300 milliardir í danska statskassan, tað er uml. helvtin av teirra uttanlandsskuld, men vit skulu nýta oljuna til at menna okkara land, so vit kunnu gerast eitt frælst fíggjarligt land eins og t.d. Kuwait við óavmarkaðum møguleikum fyri ungdómi okkara og ikki verða eitt útpínt hjáland, sum t.d. Hetland. Valið er okkara, hvat av hesum ynskja vit. Velja vit tað seinasta kann tað lætt henda, at vit fáa núverandi støðuna hjá oljulandinum TJETJENIA, sum tann russiska bjørnin hevur lagt sín lodna labba á.

Jákup Olsen.